# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 26.10.2020*

**Bygdaráðsfundur 26.10.2020 kl. 18.00 til kl. 19.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Selma Hansen. skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 84/2020 Fíggjarætlan fyri 2021 – Roðin**

J.nr. 32102-3-2020

**Málslýsing**

Økistænastan Roðin hevur sent uppskot um fíggjarætlan fyri 2021 til ummælis hjá kommununi.

Samlaði kostnaðurin fyri 2021 hjá Roðanum er mettur til tkr. 87.166, sum er ein hækkan á tkr. 4.142 í mun 2020, ein hækkan uppá 5,0 %. Eftir at brúkarin hevur goldið brúkaragjaldið, er upphæddin hjá kommununum tkr. 77.474. Í samstarvinum verður upphæddin býtt soleiðis: Runavíkar kommuna tkr. 50.311, Nes kommuna tkr. 14.959 og Sjóvar kommuna tkr. 12.204.

Parturin hjá Nes kommunu fyri 2021, er ein meirútreiðsla á tkr. 790, sum er ein hækking á 5,6%.

| **Inntøkur** | **2021** | **2020** | |
|---|---|---|---|
| Eftirløn | 9.311 | 9.569 | (framroknað tal) |
| Dis/Fas v.m. | 2.920 | 2.959 | |
| **Endurgjald íalt frá landinum** | **12.231** | **12.528** | |
| Parturin hjá Nes kommunu | 14.959 | 14.169 | |
| **Hjá Nes kommunu at fíggja** | **2.728** | **1.641** | |

**Tilmæli**

Á fundi 21.10.2020 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini hjá Roðanum fyri 2021 soleiðis, sum fíggjarætlanin er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 26.10.2020*

**Mál nr. 85/2020 Fíggjaræltan rakstur fyri 2021 – Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið**

J.nr.140002-1-2020

**Málslýsing**

Skálafjarðar kommunala Sløkkilið hevur sent uppskot um fíggjarætlan fyri 2021 til ummælis hjá kommununi.

Nevndin fyri Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið hevur á fundi 22. september 2020 viðgjørt fíggjarætlan fyri árið 2021. Nevndin mælir til, at gjaldið frá kommununum til SKS verður eins og undnafarna ár kr. 305,00 pr. íbúgva. Grundarlag fyri íbúgvaratali er 01.01.2020.

Íbúgvaratalið í Nes kommunu pr. 01.01.2020 er 1338. Mánaðarliga gjaldið til SKS í 2021 verður tkr. 34, í alt tkr. 408 fyri 2021.

**Tilmæli**

Á fundi 21.10.2020 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini hjá Skálafjarðar Kommunala Sløkkiliði fyri 2021 soleiðis, sum fíggjarætlanin er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 86/2020 Fíggjarætlan íløga fyri 2021 – Skálafjarðar Sløkkilið**

J.nr. 1400002-1-2020

**Málslýsing**

Nevndin fyri Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið hevur á fundi 22. september 2020 viðgjørt íløguætlanina fyri árið 2021. Nevndin mælir til hesar íløgur: Liðugtgerð av lofti í høllini á Skála, skitsuprojekt til nýggja høll í Rókini og dronu til leiting/oljudálking – íalt tkr. 525.

Parturin hjá Nes kommuna er tkr. 107.

**Tilmæli**

Á fundi 21.10.2020 mælir Fíggjarnevndin til at tkr. 107 verður sett av á fíggjarætlanini fyri 2021 til Skálafjarðar Sløkkilið - íløga.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 87/2020 Fíggjarætlan rakstur fyri 2021 – Heilsumiðstøðin**

J.nr. 32102-8-2020

**Málslýsing**

Sambært fyribils løgdu fíggjarætlanini hjá Runavíkar Kommunu kemur fíggjarætlanin hjá Heilsumiðstøðini at ljóða uppá tkr. 1.514. Parturin hjá Nes Kommuna er tkr. 371.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 26.10.2020*

**Tilmæli**
Á fundi 21.10.2020 mælir Fíggjarnevndin til at tikið verður undir við fíggjarætlanini hjá Heilsumiðstøðini rakstur soleiðis, sum fíggjarætlanin er uppsett.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 88/2020 Fíggjarætlan rakstur fyri 2021 – Barnaverndartænastan**
J.nr. 32102-9-2020
**Málslýsing**
Sambært fyribils løgdu fíggjarætlanini hjá Skálafjarðar Barnaverndartænastu fyri 2021 kemur raksturin at ljóða uppá tkr. 10.617. Parturin hjá Nes Kommuna er tkr. 2.180.

**Tilmæli**
Á fundi 21.10.2020 mælir Fíggjarnevndin til at tikið verður undir við fíggjarætlanini hjá Barnaverndartænastuni soleiðis, sum fíggjarætlanin er uppsett.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 89/2020 Setan av skrivara  Lukkað**
J.nr.8101012-9-2020

**Mál nr. 90/2020  Ársroknskapur 2019 – Kongshavnar Havn**
J.nr. 814002-3-2018
**Málslýsing**
Ársroknskapurin fyri 2019 hjá Kongshavnar havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmæli**
Á fundi 21.10.2020 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum fyri 2019, hjá Kongshavnar Havn soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 91/2020  Dagføringar av adressum**
J. nr. 501012-1-2020
**Málslýsing**
Neyðugt er viðhvørt at dagføra adressur í samband við nýggjar búsetingar í kommununi.

Eitt øki hesum viðvíkjandi er nýggja búsetingin norður frá Gaddavegnum. Tá hann var longdur norðeftir, var eisini farið yvirum postmarkið millum Nes og Toftir, og fyrsta búsetingin fekk adressuna Gaddavegur 51, Toftir.

Omanfyri vegin eru nú eisini 2 nýggj grundstykkir staðsett, sum ikki enn hava skrásetta adressir, og tað vera fleiri við komandi útstykking.

**Tilmælir**
Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at vegurin norðureftir, frá vegamótinum Kvíggjarvegur/Gaddavegur, fær navnið Ólavsvegur.

Á fundi 21.10.2020 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 92/2020 Dagføringar hjá Landsverk fram við landsvegnum**
J. nr. 500002-1-2019
**Málslýsing**
Eitt ávíst samskifti er millum Nes kommunu og Landsverk um ymiskar dagføringar fram við landsvegnum í Nes kommunu.

Landsverk skrivar til Nes kommunu tann 1. oktober 2020:

Sum liður í tilgongdini er ynskiligt at Nes kommuna fær høvi at viðmerkja hesar ætlanir, og verður heitt á teknisku nevnd í kommununi um at viðgerða uppskot til fyriliggjandi loysnir og venda aftur til Landsverk.

1) **Busslummi á Saltnesi – sunnanvert Roykheyggj.**
   Fyriliggjandi uppskot, ið hevur verið til umrøðu millum partarnar, eigur at taka støði í at ferðin skal samsvara vanligari býarkoyring, tvs. 50km/t. Umráðandi er at:
   1. kanna eftir um útsýnið frá ferðslu, ið koyri inn á landsvegin sunnan fyri busslumman hevur nøktandi útsýni.
   2. íbindingin er meiri vanrætt og vinkulrætt á landsvegin.
   3. staðseting av trapezformaðari 50km/t bungu við fótgangarateigi norðan fyri busslumman.
   4. hóskandi ljós og skýli til fótgangarateigin verður staðsett.

2) **Vegastrekkið frá Fríðrikskirkjuni og inneftir – við Heygsvegin**
    1. Á vegamótinum Toftavegur / Heygsvegin verður staðsettur ein fótgangarateigur á trapez-bungu við tilhoyrandi ljósi.
3) **Vegastrekkið oman á Rætt**
    1. Landsverk setir upp bilverju við gloppi á ca. 1,5 m til gangandi at frá gøtuni omanfyri. Fótgangarateigur við ljósi verður eisini at seta upp.
4) **Vegamótið við niðankoyingina til Svangaskarð**
    1. Ongar broytingar. Fótgangarateigurin á vegastrekkinum skal málast.
5) **Bilverja manglar eitt stekki frá Saltnesi og úteftir**
    1. Farast skal undir arbeiðið ætlandi ísv. fíggjarárið 2021. LV stendur fyri arbeiðinum. Kommunan skal gera neyðugu hoyringar frá eigarunum niðanfyri fyrst.

**Tilmæli**
Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at fylgja øllum tilmælum frá Landsverk. Tó í sambandi við punkt 1, at hava omankoyringina til bryggjuna í Saltnesi við í ætlanini.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 93/2020  Umsókn um byggiloyvi til goymslubygning</u>**
<u>J. nr.  803252-2-2020</u>
**Málslýsing**
Tann 16.09.2020 móttekur Nes kommuna eina umsókn frá Jógvan M. Olsen, umboðandi M/B Glúpur, har hann søkjur um byggiloyvi til ein goymslubygning á havnalagnum. Umsøkjarin vísir á økið norðanfyri neystini í Krabburð, omanfyri vegin.

**Tilmæli**
Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva loyvi í mun til tað sum verandi økið loyvir. Gongubreytin skal tó hava somu breidd sum norðanfyri.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 26.10.2020*

**Mál nr. 94/2020 Broytingar leigumál á havnalagnum**

J. nr.803252-1-2020

**Málslýsing**

Plattavirkið, sum fórst av eldsbruna í 2017, verður ikki bygt aftur, hóast kommunan gav prinsipelt byggiloyvi fyrr í ár. Veðhavarin av matr. nr. 435i, Norðoya Sparikassi, hevur sent umsókn til Nes kommunu, og søkir um, at SP/F GC Rieber Føroyar, sum Norðoya Sparikassi hevur ætlanir um at gera yvirtøkuavtalu við, yvirtekur leigumálið av matr. nr. 435i.

**Tilmælir**

Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at SP/F GC Riber Føroyar yvirtekur leigumálið hjá Plattavirkinum.

Á fundi 21.10.2020 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

**Avgerð**

Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 95/2020 Umsókn um byggiloyvi til vinnubygning**

J. nr. 803252-3-2020

**Málslýsing**

Nes kommuna hevur móttikið eina umsókn um byggiloyvi til vinnubygning frá GC Rieber Føroyar.

Bygningurin, sum verður 47 x 35,60 m til støddar, kemur at verða staðsettur har Plattavirkið var og suðureftir. Bygningurin skal nýtast til saltgoymsla, goymslu av pakningi v.m. og skrivstovu.

**Tilmæli**

Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi sambært umsóknini 8. Oktober 2020. Tó skal ásetingin um mest loyvdu hædd á 10 m haldast.

Eisini mælir nevndin til at fasadan fær eina dámliga klæðing.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 96/2020 Umsókn um byggiloyvi til uppíbygning**

J. nr. 803002-7-2020

**Málslýsing**

25.09.2020 móttekur Nes kommuna eina umsókn frá fiskavirkinum hjá Faroe Origin á Toftum, har biði verður um byggiloyvi til ein uppíbygning.

Staðsetingin er á niðaru síðu, frá útbygninginum har suðuri og norðureftir. Breiddin er 7,20m og longdin 42,36m. Hæddin við útveggin er 4,50m, og við einum takhalli upp til verandi tekkju.

Endamálið við hesari útbygging er at fáa pláss fyri eini upptiningarskipan, soleiðis at rávøran blívur meira støðug, til frama fyri rakstur, og arbeiði hjá starvsfólki. Eisini skal rávøran, tá hon fer inn á virkið, fáast undir tak.

Sjógvur skal nýtast til upptiningarskipanina og ein leiðing skal leggjat út á sjógv. Og fyri at fáa sjógvgóðskuna í lagi, er neyðugt, vegna frástøðu til kloak- útlát, at fara 100m úr landi.

Arbeiðnum viðvíkjandi leiðingum á landi, ynskja teir at kommunan tekur lut.

**Tilmælir**
Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi sambært viðløgdu ætlan. Harumframt mælir nevndin til at Nes kommuna tekur sær av øllum arbeiðnum við at fáa leiðingina frá útveggi á uppíbygningi, og oman til sjóarmálan.

Tað er grevstur av kaðalgrøv, veitan og leggjan av pumpuleiðing, tyrvan av kaðalgrøvini, og asfaltera aftur.

Á fundi 21.10.2020 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og mælir til, at tkr. 120, sambært mettum kostnaði hjá Tekniska leiðaranum, verður sett av á fíggjarætlanina fyri 2021.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 97/2020 Umsókn um byggiloyvi**
J. nr.234022-26-2020
**Málslýsing**
08.09.2020 kemur umsókn frá Janus Trúgvason, sum vegna Dan og Annelisu Hansen søkir um byggiloyvi til eini sethús. Staðsetingin er matr. nr. 440d á Brekkukletti 14 Toftir.

Talan er um eini sethús í tveimum hæddum við slættaru tekju. Bilhús er eisini partur av húsinum.

**Tilmæli**
Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi sambært viðløgdu skjølum.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 26.10.2020*

**<u>Mál nr. 98/2020 Umsókn um uppískoytisstykki  Alment</u>**

<u>J.nr 201002-2-2020</u>

**Málslýsing**

31.08.2020 móttekur Nes kommuna teldupost frá Elsu og Anders í Hjøllum, har tey søkja um eitt uppískoytisstykki. Ætlanin er at byggja uppí húsini, gera stóra skrivstovu, útistovu, terassu, og lítlan urtagarð.

**Tilmæli**

Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til umsøkjarin fær loyvi at ogna sær 10m suðureftir, soleiðis at teir síðstu 5m, sum sambært avtalu millum umsøkjarin og teknisku deild tann 9 oktober 2020, kunnu leggjast afturat íbúðarbygging sunnanfyri.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Súni í Hjøllum var úti undir viðgerðini

**<u>Mál nr. 99/2020  Umsókn um prinsipielt byggiloyvi</u>**

<u>J. nr. 234022-24-2020</u>

**Málslýsing**

21.07.2020 hevði tekniski leiðarin hjá Nes kommunu fund við eigarin av matrikli 391 við Hjallavegin. Eigarin greiddi frá ætlanum um at víðka um bústaðin og eigarin kunnaði seg um hvat møguligt var at gera, áðrenn meira bleiv gjørt við tekningar v.m.

Teir lótu inn eina fyribilsætlan við frágreiðing og tekningum, sum í stuttum umfatar:

1. byggistig. Ein nýggjan bygning í tveimum hæddum sunnanfyri verandi sethús. Her vera 2 íbúðir. Ein í neðra og ein í erva.

Seinni er so ætlanin at fara undir 2. byggistig, har tað gamla skal rívast niður, og nýtt byggjast.

Um loyvi verður givið, verður søkt um meira lendi omanfyri.

Á fundi 26.08.2020 mælir Tekniska nevnd til at tekniski leiðarin fer í dialog við umsøkjarin fyri at kannað um til ber at skipað økið øðrvísi til ætlaðu byggingina.

Her verður serliga hugsa um parkeringisviðurskiftir, staðseting av bygningi, og víðkan av grundstykkinum.

**Tilmæli**
Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva loyvi til byggistig 1, treytað av at bygningurin fer longri niðan og planeringin verður nakað lækkað í mun til verandi.

Eisini skal umsøkjarin ognar sær 5m afturat norðureftir til parkering.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 100/2020 Umsókn um innilokan av privatum vatnbrunni**
J. nr.234022-25-2020
**Málslýsing**
06.09.2020 kemur skriv frá Haraldi Kjeld, har hann søkir um loyvi at inniloka gamla vatnbrunnin á matrikli 323 í Saltnesi.

Ætlanin er at nýta húsið til skýli hjá seyðunum. Brunnurin er ca. 2,40 x 2.40m.

**Tilmæli**
Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva loyvi. Hettar er tó treytað av, at húsið kann takast burtur uttan endurgjald, um tað forðar fyri eini komandi útbygging.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 101/2020 Leingjan av vegi til moldgoymsluna**
J. nr.10000049-1-2020
**Málslýsing**
Í 2013 var byrja at koyra mold á felags moldgoymsluna við Skoragil.

18.05.2020 var fundur millum Runavíkar og Nes kommunu um moldgoymsluna, í samband við at tørvur er á størri útbreiðsluøki. Avgjørt var at teknisku deildirnar hjá báðum kommunum tóku stig til at kortleggja verandi øki, og fáa eitt uppskot um leingjan av atkomuvegi við kostnaðarmeting, sum skuldi leggjast fyri politisku skipanina við atliti til fíggjarætlanina 2021.

Felagi Munin, sum gjørdi fyrstu uppmáting av atkomuvegnum, bleiv biðin at gera hettar arbeiði.

Nú fyriliggur ein uppmáting av verandi øki, eitt liðugt projekt um víðari atkomuveg, og ein kostnaðarmeting.

**Tilmæli**
Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at bjóða vegin út.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 102/2019 Umbøn um játtan til skúlastýrið fyri 2021**
J.nr.32102-4-2020
**Málslýsing**
Í skrivi 24.09.2020 søkir skúlastýrið fyri Tofta skúla um eina játtan fyri 2021, áljóðandi tkr. 50 til tað vanliga skúlastýrisarbeiðið. Sama upphædd sum er játta fyri 2020.

Eisini verður søkt um eina játtan áljóðandi tkr. 5 til foreldraráðið. Sama upphædd sum er játta fyri 2020.

Somuleiðis er ein umbøn um eykajáttan til eina nøgdsemiskanning í 2021 á tkr. 30. Nøgdsemiskanningar eru gjørdar í Tofta skúla í 2012 og 2016.

**Tilmælir**
Á fundi 16.10.2020 mælir Mentanarnevndin til at ganga umsóknini á møti og játta skúlastýrinum fylgjandi fyri 2021: tkr. 50 til skúlastýrisarbeiðið, tkr. 5 til foreldraráðið og tkr. 30 til eina nøgdsemiskanning.

Á fundi 21.10.2020 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 103/2020 Fíggjarætlan skúlans 2021 Blokkur**
J.nr.32102-5-2020
**Málslýsing**
Námsfrøðiliga ráðið hevur á fundi 16.09.2020 viðgjørt fíggjarætlan skúlans til komandi fíggjarár.

Fyri fíggjarárið 2020 fekk Tofta skúli eina játtan til blokkin á tkr. 680 umframt tkr. 160 til KT útbúnað.

Til fíggjarárið 2021 søkir Námsfrøðliga ráðið um eina størri játtan, áljóðandi tkr. 700 til blokkin, og tkr. 200 til KT útbúnað.

**Tilmælir**
Á fundi 16.10.2020 mælir Mentanarnevndin til at ganga umsóknini á møti og játta fylgjandi fyri 2021: tkr. 700 til blokkin, umframt tkr. 200 til KT útbúnað.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 26.10.2020*

Á fundi 23.10.2020 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 104/2020 Umsókn um stuðul – Bátafelagið /Undirhúsið**
J.nr. 32102-6-2020
**Málslýsing**
Í skrivi 18.09.2020 søkir Bátafelagið um fíggjarligan stuðul áljóðandi tkr. 45 til Undirhúsið á Toftum fyri árið 2021. Peningurin skal nýtast til rindan av leigu og aðrar húsaútreiðslur, og er sama upphædd, sum Nes kommuna hevur stuðlað Undirhúsinum við í 2020.

**Tilmælir**
Á fundi 16.10.2020 mælir Mentanarnevndin til at játtað Undirhúsinum tkr. 45 í stuðli til høliskostnað fyri 2021.
Høgni Hansen var úti undir viðgerðini

Á fundi 21.10.2020 tekur Fíggjarnevndin undur við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.
Høgni Hansen var úti undir viðgerðini
**Avgerð**
Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.
Høgni Hansen var úti undir viðgerðini

**Mál nr. 105/2020 Fíggjarætlan 2021 – onnur viðgerð**
J.nr.32102-2-2020
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2021 var fyri á bygdaráðsfundi 28.09.2020.

**Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til aðru viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2021, hjá Nes kommunu, eftir broytingar vera hesi:**

| Rakstur tkr. | 2021 | 2020v/eykaj. | Munur | % |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 5.057 | 5.220 | -163 | -3,1 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 19.437 | 18.171 | 1.266 | 7,0 |
| §3 Børn og ung | 13.453 | 12.032 | 1.421 | 11,8 |
| §4 Undirvísing | 4.189 | 4.153 | 36 | 0,9 |
| §5 Mentan og frítíð | 4.150 | 4.026 | 124 | 3,1 |
| §6 Teknisk mál | 4.774 | 4.517 | 257 | 5,7 |
| §7 Kommunalt øki | 3.694 | 3.332 | 362 | 10,9 |
| **Rakstur í alt** | **54.754** | **51.451** | **3.303** | **6,4** |

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 26.10.2020*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§20 Inntøkur v.m.** | **63.990** | **60.455** | **3.535** | **5,9** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **9.236** | **9.004** | **232** | **2,6** |
| | | | | |
| **Íløgur tkr.** | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 | 0 | 0 | 0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 1.613 | 1.489 | 124 | 8,3 |
| §3 Børn og ung | 500 | 10.892 | -10.392 | -95,4 |
| §4 Undirvísing | 0 | 750 | -750 | -100 |
| §5 Mentan og frítíð | 0 | 2.578 | -2.578 | -100 |
| §6 Teknisk mál | 82 | 7.684 | -7.602 | -98,9 |
| §7 Kommunal virki | 1.172 | 3.053 | -1.881 | -61,6 |
| **Íløgur í alt** | **3.367** | **26.446** | **-23.079** | **-87,3** |
| | | | | |
| **Úrslit aftaná íløgur** | **5.869** | **-17.442** | **23.311** | **133,7** |
| | | | | |
| **Afturgjald av skuld** | **4.160** | **3.223** | **937** | **29,1** |
| | | | | |
| **Av tøkum peningi** | **-1.709** | **6.665** | **-8.374** | **-125,6** |
| | | | | |
| **Lántøka** | **0** | **14.000** | **-14.000** | **-100** |

**Tilmæli**
Á fundi 23.10.2020 mælir Fíggjarnevndin til at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 5.500.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Tilmæli**
Á fundi 23.10.2020 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2020 soleiðis, sum hon er uppsett. Afturgjald av skuld tkr. 4.160 verður fíggjað við rakstraravlopið. Íløgurnar á tkr. 3.367 verða fíggjaðar við rakstaravlopið og tkr. 1.709 verður flutt til tøkan pening.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.